# Posta Stamps

Føroyar

Nr. 41

September 2019



- Postgjaldsmerki 2019: Útróður
- Eitt serstakt frímerkjasavn
- Blíðar heilsanir úr Fraklandi
- Jólamerki 2019
- Árbók og ársmappa 2019

Posta

FAROE ISLANDS




Royndarprent




# Útróður

Eitt tað mest sermerkta orðið á føroyskari tungu er "útróður". Tað at rógva út – t.v.s. at rógva út frá landi at fiska. Stutt sagt er útróður, í mun til skipsfiskiskap, ein stuttur túrur við báti ella deksbáti.

**Álítandi tilfeingi**

Útróður hevur síðan landnámstíð verið avgerandi fyri at fólk yvirhøvur kundi búleikast í Føroyum. Landbúnaðurin var einfaldur og fátæksligur og fevndi serliga um seyðahald, neytahald fyri at fáa mjólk og korndyrking – sum í miðal miseydnaðist triðja hvørt ár – seinni avloyst av eplavelting. Umframt landbúnaðin var umfatandi útróður tí av avgerandi týdningi fyri at skaffa matvørur til fólkið.

Fiskurin var yvirhøvur eitt álítandi tilfeingi, havleiðirnar kring Føroyar eru ríkar – og tað var sjáldan at fiskiskapurin sveik.

**Fiskiárið**

Serliga toskur og hýsa vóru álitið hjá útróðrarmonnum. So týðandi, at fiskiárið varð lagt eftir hvussu fiskurin svam og hvørjum standi hann var í. Um heystið var fiskurin lítil og gekk spjaddur – og fiskiskapurin var tí hareftir.

Men í torratíðini, frá (mána)tendring seinast í februar til næstu tendring, kemur hýsan inn móti landi at gýta og fiskurin er størri og feitari. Torrafiskur var altíð hámettur og árstíðin tann besta at turka hann í.

Men besta fiskitíð mundi várróðurin vera – frá síðst í februar, mars mánað út og inn í apríl, tá toskurin gýtur og gongur í torvum á várgrunnunum norðanfyri. Várfiskurin er stórur og feitur – og fiskurin er fastari enn toskur aðrastaðni. Um fyrra aldarmóti, mest sum oyddu bretskir trolarar várgrunnarnar, men seinni mentist várróðurin aftur.




*Útróður. Myndir: Suffía Nón*

**Frá snøri til línu**

Frá gamlari tíð hava menn altíð brúkt føroyskar bátar til útróður. Tað gera teir fyri so vítt enn, men meginparturin av útróðrarmonnum hava nú deksbátar av ymsari støðd.

Og tað er ikki longur bara til egið brúk, at fiskað verður. Útróðurin er í dag ein lítil partur av føroyska fiskiídnaðinum. Meginreglan er "ein húkur, ein fiskur" - burðardygg smáveiða, uttan spill og hjáveiðu, sum annars plágar heimsins fiskatilfeingi.

Og hóast ársins gongd enn virkar sum karmur fyri fiskiskapin, eru veiðihættirnir eitt sindur broyttir. Fyrr varð fiskað við snøri, har fiskurin varð drigin við hond.

Í dag brúka serliga smærru bátarnir snellu, meðan størri deksbátar seta línu.

**Evnisvalið á postgjaldsmerkjunum**

Listakvinnan Suffía Nón hevur teknað ársins vøkru postgjaldsmerki.

Á fyrsta merkinum sæst ein útróðrarmaður í ferð við at taka línuna inn.

Á næsta merkinum reinsar hann fiskin umborð, til gleði fyri sjófuglin, ið fær slógvið.

Á triðja merkinum liggja deksbátar við kai – kanska meðan bíðað verður eftir várróðrinum.

Og á fjórða merkinum verður engt upp í stampar. Sum tað sæst av bókstavunum FD á stampinum, man Suffía hava tikið myndevnið úr heimbygdini Fuglafirði.

*Anker Eli Petersen*




*Smáarkið "Postverk Føroya 25 ár", sum kom út 2. apríl 2001*

# Eitt serstakt frímerkjasavn

Í vár hevði frímerkjadeildin hjá Posta forkunnuga vitjan av týska frímerkjasavnaranum Dieter Echterhoff.

Dieter Echterhoff var ikki ørindaleysur. Við sær hevði hann eitt forkunnugt savn av postkortum, sum vóru stemplað 2. apríl 2001 á øllum teimum táverandi posthúsum. Tey vóru í 2001 32 í tali. Av tí at sonur hansara ongan áhuga hevur í frímerkjum, ynskti hann nú at handa Posta hetta savn sum gávu.

Sjálvur sigur Echtehoff soleiðis, um orsøkina til at hann fór undir at savna postkortini á henda hátt:

*"Eftir at frímerkjadeildin gav út eina røð av postkortum við myndum av teimum bygdum, sum høvdu egið posthús, kom mær til hugs at nýta hesi postkort til eitt heilt serligt savn.*

*Ynski mítt var at fáa eitt postkort - sent beinleiðis til mín – frá øllum hesum posthúsum. Postkortini skuldu stemplast við vanliga dagstemplinum hjá posthúsunum. Um tað mundið kundi Postverk Føroya hátíðarhalda sín 25 ára stovningardag og eg sá her ein møguleika at gera hetta savn enn meiri áhugavert.*

*Mál mítt var nú – sjálvan útgávudagin hjá smáarkinum "Postverk Føroya 25 ár" - at øll hesi postkort skuldu frankerast við frímerkjum úr smáarkinum, stemplast sjálvan útgávudagin og síðani sendast til mín.*

*Av tí at 1. apríl 2001, sjálvur 25-ára dagurin, var ein sunnudag, kundi smáarkið ikki koma út fyrr enn 2. apríl og tí er tað dagfestingin á stemplinum.*

*Tá tað í hesum føri er vanliga dagstemplið hjá posthúsunum, sum er brúkt, eru hesi postkort verulig fyrstadagspostkort og bjálv-*



*Her handar Dieter Echterhoff frímerkjasavnið til Posta*

*arnir, sum postkortini vóru í, eru veruligir fyrstadagsbjálvar."*

Posta takkar Dieter Echerhoff hjartaliga fyri hetta forkunnuga savn og hugnaligu vitjanina.

Okkara trúføstu viðskiftafólk minnast kanska hesa postkortrøðina við myndum av øllum bygdum, sum høvdu egið posthús. Tað vóru hesi postkort, sum góvu honum hugskotið til at fara undir hetta savnið.

Niðanfyri er postkortið av Fámjin avmyndað. Á sama hátt vórðu øll hini postkortini viðgjørd og stemplað.











*Charlotte (Eriksen) Montiel. Egin mynd.*

# Blíðar heilsanir úr Fraklandi

Í 2019 kann mín donsk/franska fyritøka Catamaran (www.catamaran.fr) hátíðarhalda 25 ára stovningardag. Ein av mongu tænastunum, sum eg bjóði, er umsetingar, og í ár kann eg eisini hátíðarhalda 25 ár sum franskur umsetari fyri Posta.

Fystu ferð eg kom í samband við Posta var á eini frímerkjaframsýning í París. Eg starvaðist tá hjá donsku fyritøkuni Nordfrim og stóð á básinum við síðuna av Posta, sum tá kallaðist Postverk Føroya. Eg tók ein faldara, ið lá á básinum og sá at har vóru fleir grammatiskir feilir umframt fleiri umsetingarvillur. Hetta segði eg við ábyrgdarhavandi, sum var Svanbjørg Manai. Hon segði, at um eg kundi rættað skeivleikarnar, so vildu tey fegin samstarva við meg og soleiðis kom tað í lag.

Vanliga verður umsett úr fremmandamáli til móðurmálið. Eg umseti tó eisini til franskt: havi búð í Fraklandi síðani eg var 22 ára gomul, eri útbúgvin fransktlærari, tosi og skrivi franskt hvønn dag og síðst, men ikki minst, so lesur ein fransktalandi umsetari hvørja einastu umseting, sum eg geri fyri Posta, og fingrarnir verða ikki lagdir ímillum.

Løgið er, at tað er ikki fyrr enn tú umsetur ein tekst, at tú finnur veikleikarnar í honum. Lesur tú ein vanligan tekst, so letur heilin ymisk ivamál fara framvið, men tá tú skalt umseta, so kemur tú heilt inn undir húðina á skrivaða orðinum. So onkuntíð fær ein góður umsetari bøtt um upprunatekstin, tá hann verður umsettur til annað mál.

Mær dámar sera væl at arbeiða fyri Posta. Uppgávurnar eru spennandi og avbjóðandi innan fyri sera nógv øki og orðatilfeingi. Serliga væl dámar mær tað, sum á donskum verður sagt “med venlig hilsen”. Posta skrivar nevniliga altíð í teirra teldu-



*Charlotte og synirnir á Viðareiði. Egin mynd.*

postsamskifti *"Blíðar heilsanir"* – eg haldi at tað er so vakurt.

Tyngstu uppgávurnar, eg havi gjørt fyri Posta, vóru í farnu øld, tá tey høvdu eina røð av greinum um føroyska postsøgu. Tað var sera keðiligt arbeiði, ein rúgva av endurtøkum av orðum og setningum (hetta er bannað í einum vøkrum týddum fronskum teksti), so tá tann røðin helt uppat, var umsetarin glaður. Men tá ein tekstur frá Anker Eli kemur, so veit eg, at har kemur ein stuttlig og kreativ umseting burturúr. Eina ferð umsetti eg eitt heilt hefti við uppskriftum upp á jólasmáløkur við vøkrum tekningum. Eg fekk ein bunka av hesum faldarum sendandi til París og eg býti framvegis út av hesum heftum til fransmenn, sum dáma væl at baka køkur. Tað var stuttligt at umseta tann faldaran.

Ofta fái eg tekstir sendandi, sum eru skrivaðir á fullkomnum donskum, men eg síggi ofta um teir eru skrivaðir av einum føroyingi. Tá kann tað henda, at har stendur eitt "sum" í staðin fyri "som" og "á" í staðin fyri "af". Seinastu 25 árini havi eg lagt til merkis, at nú verður skrivað Tórshavn í øllum tekstum og ikki tað danska Thorshavn.

Arbeiðið við týðing er nógv broytt hesi 25 árini. Áðrenn internetið kom, fór eg á bókasavnið at læna bøkur um fiskar, fuglar, bíbliuna, kort yvir Føroyar og ringdi til fakfólk fyri at fáa hjálp til fakorð í tekstinum. Tá ein umseting hevði skund, varð ein disketta send við skundposti til Føroya. So kom internetið og teldupostur, og tað broytti alt, men eg brúki enn nógva tíð upp á umsetingar, tí tað er ikki alt tú finnur á netinum, sum er rætt.





*Seyður er allastaðni at síggja. Charlotte frammanfyri torvkomfýrinum í Hoyvíksgarði. Egnar myndir.*

Í 1999 vann Posta eina virðisløn á viðurkendu fronsku frímerkjaframsýninginí "*Philexfrance*" fyri sínar vøkru og vælskrivaðu fronsku faldarar. Eitt stórt herðaklapp til Posta, men kanska eisini til umsetaran.

Sjálvandi havi eg verið í Føroyum. Øll tey vøkru frímerkini góvu mær hug til at fara hagar, og tað gjørdi eg í 2008 við báðum synum mínum. Vit plagdu at skemta við, hvør kundi taka eina mynd uttan at ein seyður var við á myndini. Teir eru nevniliga allastaðni. Hetta var í juli mánað. Vit vóru í heitum jakkum hvønn dag, so skemtað varð eisini við, at tað var sikkurt ordiliga deiligt at vera her um summarið. Men tað var deiligt allastaðni.

Vit høvdu býtt um bústað við eina føroyska familju, ið so búði í okkara íbúð í París, og ein dagin hekk ein posi frá grannunum á úthurðini. Ongantíð áður havi eg smakkað so feskan og góðan fisk, ongantíð. Og eg havi heldur ikki áður upplivað so reina og fríska luft, at man næstan kundi smakkað hana. Vit gingu túrar og vitjaðu tey ymisku søvnini. Børnum dámar ikki so væl søvn, men eg segði at ein tíma av lívinum kundu tey brúka upp á at vitja søvn. Síðani gav eg teimum myndatólið og bað tey taka myndir av tí, sum teimum dámdi. Vit fingu nakrar stuttligar myndir burturúr tí. Vit tóku eisini eina mynd á Hoyvíksgarði, har eg siti framman fyri einum gomlum torvkomfýri. Hetta vístu vit fólki í París og søgdu til stuttleika, at soleiðis var køkurin í læntu íbúðini (ìbúðin, ið vit læntu, hevði annars ein sera flottan køk)....

Vit høvdu væntað at vit fóru at eta nógv føroyskt lambskjøt, meðan vit vóru her, men vit funnu út av at lambskjøtið í handlunum kom úr New Zealandi. Vit frættu





*Í Saksun og ein tími á Listasavni Føroya. Egnar myndir.*

síðani, at føroyskt lambskjøt er nakað, sum man keypir beinleiðs frá hvørjum øðrum.

Vit smakkaðu eisini ræst kjøt og fingu tað næstan sum ein manndómsprøva hjá eini familju. Tað smakkaði væl, bæði heitt og kalt í tunnum skivum, men løgið nokk, tað sum vit tóku við til París, var ikki líka lekkurt. Soleiðis er tað ofta við lokalum spesialitetum, teir skulu drekkast og etast í tí rætta høpinum.

Nú droymi eg um at vísa manni mínum, sum er úr Korsika, Føroyar. So áðrenn tit vita av, so eri eg aftur her.

*Charlotte Montiel*

*Charlotte (Eriksen) Montiel er 55 ára gomul og fødd í Keypmannahavn. Frá 1982-1986 tók hon læraraprógv við donskum og fronskum sum linjufak á N. Zahles Seminarium.*

*Síðani flutti hon til París og í 1994 byrjaði hon sína egnu ráðgevarafyritøku: Catamaran business assistance France – Danemark. www.catamaran.fr.*

*Hon umsetur fyri fleiri privatar fyritøkur og stovnar og hevur m.a. umsett filmin "Festen" og sendirøðina "Herrens veje" til franskt.*

*Hon var tulkur hjá Bjørn Nørgaard í sambandi við gobelinurnar hjá drotningini, ið vórðu vovnar í París; hon tulkar eisini fyri danskar og franskar ráðharrar, almennar sendinevndir, fyritøkur og leggur harumframt lestrarferðir til rættis.*

## Jólamerkini




30 DKK

## Jólakort:
## Dupult jólakort við bjálva (3)




25 DKK

# Jólini 2019

### Jólamerkini 2019 - jól í miðøld

Nøkur orð frá listamanninum um ársins jólamerki:

*Føroyar hava sera unga listasøgu, og fyri 1850 varð mestsum onki hvørki teknað ella málað í Føroyum. Tí er miðaldarlist ikki til í føroyskum høpi, og eg helt tað vera stuttligt at spæla við tankan um, hvussu hetta tíðarskeiðið í føroyskari søgu kundi sæð út. Av tí at talan var um jólamerki, var sjálvsagt at tekningarnar eisini skuldu hava ein jólaligan dám.*

*Stílurin, eg havi brúkt, er úr trettandu øld. Eg havi fingið íblástur frá teimum gomlu bókunum, ið munkarnir teknaðu. Tó havi eg koyrt modernað føroysk eyðkenni í. T.d. eru føroyski búnin, maturin, báturin, o.s.fr. við, tí tey eru serstøk fyri Føroyar.*

*Ramman um merkini er eitt mynstur úr føroyska mannfólkabúnanum, tó við eini jólastjørnu sum blómu.*

*Heiðrik á Heygum (1983)*
*Útbúgvin á Listaháskolin Íslands (Iceland University of the Arts).*

Avlopið av søluni fer til Jólamerkjagrunnin, ið hevur til endamáls at stuðla tiltøkum fyri børn og ung í Føroyum.

**Jólamerkjaarkið kostar 30,00 kr.**

### Jólakort

Trý dupult jólakort við myndevnum úr jólamerkjaarkinum fáast eisini til keyps. Jólakortini verða seld sum sett við trimum kortum í hvørjum setti.

**Jólakortini kosta v/ bj. 25,00 kr. settið.**

## Ársmappa 2019




486 DKK

## Árbók 2019




498 DKK

### Ársmappa

Kundi tú hugsað tær at keypt øll ársins frímerki skjótt og ómakaleyst? So er hetta loysnin. Í ársmappuni eru øll frímerki og smáørk, ið eru givin út í ár. Mappan verður seld fyri áljóðandi virði.

**Ársmappan kostar 486,00 kr.**

### Árbók

Árbókin savnar allar ársins frímerkjaútgávur og saman við frímerkjunum fært tú áhugaverdu søguna aftanfyri hvørja útgávu lýsta við greinum og vøkrum myndum.

Tekstirnir í hesi snøggu bók eru á donskum, týskum og enskum og hóskar bókin seg tí sera væl sum gáva til vinir og kenningar uttanlands. Frímerkini eru sett í lummar í árbókini.

**Árbókin kostar 498,00 kr.**

### Svartprent!

**Eitt svartprent av "Myllum" er við í árbókini 2019 - púra ókeypis!**

**Í leysasølu kostar svartprentið 150,00 kr.**




Svartprent: Vatnmylla

# Nýggjar útgávur 1. oktober og 4. november



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Postgjaldsmerki 2019: Útróður** |
| Útgávudagur: | 01.10.2019 |
| Virði: | 4 x 11,00 kr. |
| Stødd: | 55,0 x 22,5 mm |
| Listafólk: | Suffía Nón - www.fjord.fo |
| Prentingarháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Limo Labels, Danmark |
| Postgjaldsbólkur: | Innanoyggja smábrøv 0-50 g. |


Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Jólamerkini 2019** |
| Útgávudagur: | 04.11.2019 |
| Prísur: | 30,00 kr. |
| Listafólk: | Heiðrik á Heygum |
| Prentsmiðja: | Joh. Enschedé Stamps, Holland |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Årsmappa 2019** |
| Útgávudagur: | 04.11.2018 |
| Prísur: | 486,00 kr. |
| Prentsmiðja: | TrykTeam, Danmark |



Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Árbók 2019** |
| Útgávudagur: | 04.11.2019 |
| Prísur: | 498,00 kr. |
| Prentsmiðja: | TrykTeam, Danmark |

Snið og uppsetan: Posta Stamps. Framsíðumynd: Útróðrarbátur. Myndatøka: Ólavur Frederiksen. Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

ISSN 1603-0036

# Skeribrettir

Nú hevur tú møguleikan at ogna tær hesi fýra snøggu og snotiligu skeribrettir (støðd: 23,3 x 14,3 cm). Myndevnini eru vøkru útróðramyndirnar hjá Suffíu Nón.

Skeribrettini eru framleidd úr haldgóðum tilfari og kunnu keypast sum sett við tveimum í fyri einans kr. 98,00.

Tey verða til sølu á stamps.fo og á posthúsinum á Óðinshædd fyrst í november 2019.

## Sett nr. 1





## Sett nr. 2





Royndarprent

**Posta Stamps luttekur á hesum framsýningum:**

Luttøka uttan serstempul:

**National framsýning í DGI Byen,** 18. - 20.10.2019 Keypmannahavn, Danmark
**Sindelfingen 2019,** 24.- 26.10.2019, Sindelfingen, Týskland
**Framsýning í Valbyhallen,** 9.- 10.11.2019, Keypmannahavn, Danmark

Posta FAROE ISLANDS

# Bíleggingarlepi - Posta Stamps nr. 41

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Útgáva 01.10.2019 - Postgjaldsmerki 2019: Útróður** | | | | | | |
| PMA002019 | Postgjaldsmerki 2019, óst. | * | 44,00 | 6,15 | | |
| FMG002019 | Postgjaldsmerki 2019, st. | ⊙ | 44,00 | 6,15 | | |
| DMG002019 | Postgjaldsmerki 2019, dgst. | ⊙ | 44,00 | 6,15 | | |
| FMK002019 | Fyrstadagsbjálvi v/røð | ⊙ | 49,00 | 6,85 | | |
| FML002019 | Fyrstadagsbj. v/einkultmerkjum | ⊙ | 55,00 | 7,7 | | |
| **Útgáva 04.11.2019 - Ársmappa, árbók og jólamerki 2019** | | | | | | |
| WPPE02019 | Árbók 2019 | * | 498,00 | 69,60 | | |
| PPY002019 | Ársmappa 2019 | * | 486,00 | 67,00 | | |
| PPX002019 | Jólamerkini 2019 | * | 30,00 | 4,20 | | |
| WJOJ02019 | Jólakort (3 dupult v/bj.) | * | 25,00 | 3,50 | | |
| **Mappur: Heftir og fyrstadagsbjálvar** | | | | | | |
| WHEM02019 | Heftimappa 2019 | * | 318,00 | 44,00 | | |
| WHEM02018 | Heftimappa 2018 | * | 288,00 | 40,00 | | |
| WHEM02017 | Heftimappa 2017 | * | 270,00 | 37,80 | | |
| WHEM02016 | Heftimappa 2016 | * | 259,00 | 36,30 | | |
| WFDM02019 | FDC mappa 2019 | ⊙ | 551,00 | 77,00 | | |
| WFDM02018 | FDC mappa 2018 | ⊙ | 489,00 | 68,45 | | |
| WFDM02017 | FDC mappa 2017 | ⊙ | 515,00 | 72,00 | | |
| WFDM02016 | FDC mappa 2016 | ⊙ | 455,00 | 63,70 | | |
| **Síður til lux album** | | | | | | |
| LUS002019 | Síður til lux album 2019 | | 120,00 | 16,80 | | |
| LUS002018 | Síður til lux album 2018 | | 120,00 | 16,80 | | |
| LUS002017 | Síður til lux album 2017 | | 120,00 | 16,80 | | |
| LUS002016 | Síður til lux album 2016 | | 120,00 | 16,80 | | |
| LUS002015 | Síður til lux album 2015 | | 120,00 | 16,80 | | |
| JOS002019 | Síða til jól 2019 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002018 | Síða til jól 2018 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002017 | Síða til jól 2017 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002016 | Síða til jól 2016 | | 30,00 | 4,20 | | |
| JOS002015 | Síða til jól 2015 | | 30,00 | 4,20 | | |
| LUA002019 | Lux album III v/síðum 2015 - 2019 | | 600,00 | 83,00 | | |
| LUA002014 | Lux album II v/síðum 2001-2014 | | 975,00 | 136,50 | | |
| LUA990002 | Lux album uttan síður | | 225,00 | 31,50 | | |

* = óstemplað, ⊙= stemplað

| Nr. | Vøra | | Prísur DKK | Prísur Euro | Nøgd | Í alt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ymiskt** | | | | | | |
| WSKERBRE1 | Skeribrettir 1 (2) (tøk frá 1.11.19) | | 98,00 | 13,50 | | |
| WSKERBRE2 | Skeribrettir 2 (2) (tøk frá 1.11.19) | | 98,00 | 13,50 | | |
| WNORDIA19 | Bjálvi v/serstempli: Nordia 2019 | ⊙ | 21,00 | 2,95 | | |
| WPRAGA019 | Bjálvi v/serstempli: PRAGA 2019 | ⊙ | 21,00 | 2,95 | | |
| WWUHAN019 | Bjálvi v/serstempli: Wuhan 2019 | ⊙ | 21,00 | 2,95 | | |
| WGOUDA019 | Bjálvi v/serstempli: Gouda 2019 | ⊙ | 21,00 | 2,95 | | |
| WSEP02019 | Sepac mappa nr. 10 (2019) | * | 125,00 | 16,80 | | |
| WBPMYLLUR | Svartprent: Gamlar myllur | * | 150,00 | 21,00 | | |
| | | | | | | |
| | | ***Avgreiðslugjald:*** | **25,00** | **3,50** | **1** | **25,00** |
| | | | | **Prísur íalt:** | | |

Vinaliga fyllið út teigarnar aftanfyri!

## Sepac Mappa 2019

”Historic Homes” er heitið á tíggjundi Sepac mappuni. Í mappuni er eitt frímerki úr hvørjum Sepac landi. Sepac er stytting fyri ”Small European Postal Administrations Copperation”.

Føroyska frímerkið vísir bóndahúsini í Kirkjubø.

**Prísur: 125,00 DKK.**



# Ja, takk! Eg vil fegin hava hesar vørur í hald:

| Nøgd | | | Vøra |
|---|---|---|---|
| | PPA | * | Sett av óstemplaðum frímerkjum |
| | PPS | * | Óstemplað smáark |
| | PMA | * | Sett av óstemplaðum postgjaldsmerkjum |
| | PPY | * | Ársmappa |
| | PPZ | * | Árbók |
| | PPN | * | Frímerkjahefti óstemplað |
| | FFK | ☉ | Fyrstadagsbjálvi við einum setti av frímerkjum |
| | FFU | ☉ | Fyrstadagsbjálvi við smáarki |
| | FMK | ☉ | Fyrstadagsbjálvi við einum setti av postgjaldsmerkjum |

## Gjaldshættir

☐ Upphæddin verður flutt á konto nr. 9870 4271212 hjá Posta Stamps

☐ Upphæddin skal skuldskrivast kundakonto míni

☐ **Ja, takk.** Eg ynski at bíleggingar og hald framyvir skulu gjaldast sjálvvirkandi við gjaldskortinum niðanfyri:

**Av tí at føroysku bankarnir ikki góðtaka kekkar, ber ikki longur til at gjalda við kekki**.

**Eg ynski at gjalda bíleggingina við gjaldskorti:**

Kort nr.: ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐ ☐☐☐☐

Fyrningardagur: ☐☐☐☐

Upphædd: ____________ Undirskrift: ____________

Um tú ert skrásett/-ur sum kundi hjá Posta Stamps, verður tú vinarliga biðin um at upplýsa kundanummar, tá bílagt og goldið verður.

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr./býur: ____________

Land: ____________

T-postur: ____________

Kundanummar: ☐☐☐☐☐☐☐

PS2019